# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Uppbakningurin var fantastiskur. Tað merktu vit veruliga, tá vit vóru aftanfyri 15-18. Áskoðararnir vóru heilt víst við til at lyfta liðið í dag.*

*Ulrik Wilbek, danskur landsliðsvenjari*

HM-Hondbóltur:

# Danmark vann lagnudystin - Ísland skapti sensatión

**Danmark vann avgerðandi dystin ímóti Noregi í síðsta innleiðandi dystinum, meðan Ísland skapti sensatiónina við einum stórsigri á favorittunum úr Fraklandi**

**HONDBÓLTUR**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Undan síðsta innleiðandi dystinum í HM í manshondbólti vóru vónirnar ikki góðar at fáa fleiri av okkara grannalondum víðari. Bæði Danmark og Noreg høvdu tapt fyri Ungarn í bólki E, og tí var Ungarn sikkurt uppá víðari luttøku undan seinasta dystinum, meðan vinnarin í síðsta dystinum millum Danmark og Noreg fekk seinna plássið í millumspælinum.

Í bólki B var Ísland eisini í stórum trupulleikum. Undan síðsta dystinum lógu teir javnir í stigum við Ukreina, og fyri at koma víðari skuldi Ísland vinna stórsigur á fronsku favorittunum í síðsta innleiðandi dystinum.




*Danir vóru ovurfegnir eftir týdningarmikla sigurin ímóti Noregi í síðsta innleiðandi dystinum. Á myndini síggja vit Søren Stryger, Hans Lindberg og Lasse Boesen*

*Mynd: Scanpix*



*Ulrik Wilbek var til tíðir rættiliga trýstur í dystinum móti Noregi, men eftir sigurin takkaði hann donsku áskoðarunum fyri stuðulin.*

*Mynd: Scanpix*

## Danmark sendi Noreg út í kuldan

Lagt var upp til eitt brak í bólki E, tá Danmark og Noreg brustu saman í gjárkvøldið. Fyrr um dagin hevði Ungarn vunnið á Angola, og sostatt høvdu teir tryggjað sær fyrsta plássið í bólkinum við fullum stigatali. Danmark og Noreg skuldu sostatt berast um annað plássið, og vinnarin av dystinum kundi tryggja sær víðari luttøku til millumspælið. Endaði dysturin við javnleiki, so kom Noreg víðari.

Danmark fekk tó betru byrjanina uppá dystin, og teir vóru á odda mest sum allan fyrra hálvleik. Stundum var munurin heilt uppi á 4 málum, men tá liðini fóru til hálvleiks, førdi Danmark bert við 2 málum.

Noreg tók tó eitt ordans hál fyrstu løtuna av seinna hálvleiki, har teir skoraðu 5 ferðir á rað, og nú førdu teir brádliga við trimum málum. Tað gekk tó kki long tíð, so hevði Danmark skapt javnvág í støðuna aftur, og so skiftust liðini um at skora til 5 minuttir vóru eftir av dystinum. Tá stóð á jøvnum, men síðstu 5 minuttirnar vann Danmark 2-0, og sostatt vunnu danir dystin við tveimum málum. Við sigrinum hava teir tryggjað sær víðari luttøku til millumspælið, meðan teir sendu Noreg út í HM-kuldan.

## Ísland skapti sensatiónina

Í bólki B var Ísland komið í harðan sjógv undan seinasta dystinum. Teir lógu nevniliga javnir í stigum við Ukreina, men Ísland skuldi spæla seinasta dystin ímóti Fraklandi, sum hevði vunnið báðar sínar fyrstu dystir, meðan Ukreina møtti Avstralia, sum bert var ein avgreiðsluspurningur.

Ukreina gjørdi eisini sína skyldu tíðliga um dagin við einum tryggum sigri á Avstralia, og tí lá stórt trýst á Íslandi undan dystinum ímóti Fraklandi. Einasti vegur til millumspælið var nevniliga við at vinna dystin ímóti stórfavorittunum úr Fraklandi.

Ísland lat seg tó ikki ræða av sterka franska liðnum, tí teir settu seg á dystin frá fyrsta bríksli. Eftir knappar 10 minuttir førdi Ísland 5-0, og sum hálvleikurin leið, øktu grannarnir fyri norðan bara meir um leiðsluna. Tá liðini fóru til hálvleiks førdi Ísland heili 18-8, og nú lá ein stór sensatión og lúrdi.

Í byrjanini av seinna hálvleiki kom Frakland tó eitt sindur inn í dystin. Teir minkaðu nakað um munin, men tá Joel Abati fekk beinleiðis reytt kort, var liðugt hjá fransum. Síðstu løtuna koyrdi Ísland ein tryggan sigur í hús, og endaliga úrslitið gjørdist 32-28. Við stórsigrinum tryggjaði Ísland sær eisini fyrsta plássið í bólki B frammanfyri júst Frakland.

## Favorittarnir komu víðari

Annars lagaðu úrslitini í innleiðandi bólkunum seg soleiðis, at flestu av favorittunum tryggjaðu sær víðari luttøku til millumspælið.

Í bólki A vóru Tunesia og Slovenia mett at vera sterkastu liðini, og bólkurin bleiv eisini avgjørdur ímillum júst hesi bæði liðini. Bæði liðini høvdu vunnið sínar fyrstu tveir dystir, og tí skuldi bólkavinnarin finnast í síðsta dystinum. Her vann Slovenia rættiliga tryggan sigur, og sostatt komu teir víðari til millumspælið við tveimum stigum, meðan Tunesia kom víðari uttan stig.

Í bólki C var eitt heldur óvæntað úrslit. Her vóru vertirnir úr Týsklandi mettir at vera stórfavorittar at vinna bólkin, men tað gjørdu teir ikki. Í seinastu dystinum taptu teir fyri einum sera sterkum polskum liði, og við hesum úrslitinum mátti Týskland taka til takkar við øðrum plássi, meðan Pólland streyk avstað við sigrinum í bólki C.

Í bólki D lagaðu úrslitini seg so at siga sum væntað. Spania er verandi heimsmeistari, og teir vóru eisini stórfavorittar at vinna bólkin. Spaniólarnir stóðu ímóti trýstinum og vunnu allar sínar dystir rættiliga trygt. Meir spenningur var um annað plássið, har kappingin stóð ímillum Kekkia og Egyptaland. Kekkia vann tó innanhýsis dystin millum liðini, og sostatt tryggjaðu teir sær víðari luttøku til millumspælið.

Í seinasta bólkinum, bólki F, var eingin slingur í valsinum hjá Kroatia. Teir vunnu stórsigur í øllum sínum dystum, og teimum á baki kom Russland, sum mátti kempa heldur harðari. Í fyrsta dystinum spældu teir heldur óvæntað javnt ímóti Korea, men teir komu tó víðari til millumspælið við betri málmuni enn Korea.

Sostatt megnaðu mestu sum alir av favorittunum at leika seg víðari til millumspælið, sum verður skotið í gongd mikudagin.